**Magnus Heinason - Túrfrágreiðing**
**Yvirlitstrolingar. Túrur nr. 1904 og 1906**
**Tíðarskeið: 20/2-20/3 - 2019**

---

**Fólk við frá Havstovuni:** Túrur 1904: Jens Arni Thomassen, Durita Sørensen, Guðrún Bech (fyrru viku), Marit Pedersen (seinnu viku), Heri Kallsoy (seinnu viku) og Petur Steingrund. Túrur 1906: Regin Kristiansen, Poul Vestergaard, Marit Pedersen og Sjúrður Hammer.

**Ábyrgd:** Petur Steingrund, Sjúrður Hammer.

**Endamál:** Yvirlitstrolingin á vári í ár er sum vant býtt upp í tvey (1904 og 1906) men henda frágreiðingin og øll yvirlit umboða báðar túrar. Høvuðsendamálið við túrinum var at fáa til vega tilfar, ið skal nýtast í stovnsmetingunum av toski, hýsu og upsa, t.e. veiða í vekt og í tali, longdarbýti, vektbýti, aldursbýti, kynsbýti og kynsbúning av nevndu sløgum. Umframt skuldi vekt, tal og longdarbýti skrásetast fyri øll fiskasløg, ið vórðu veidd. Eisini skuldu magakanningar gerast av toski, hýsu og upsa.

**Aðrar uppgávur:** Ongar skøtur (D. batis) vóru fingnar og harvið ongir genetiskir prøvar tiknir.

**Reiðskapur:** 116 fóts kassatrol við 40 mm meskum í posanum. Steinham lemmar. Breitlar 60 og 120 m.

**Um túrin:** Vit fóru út mikukvøldið kl. 22. Byrjaðu túr 1904 eystan fyri Fugloy og tóku støðir við land norðanfyri vegna nógvan vind. Fóru longur útfrá og gjørdu økið til Fugloyartunguna liðugt. Komu inn á Havnina at landa týsmorgunin 26. februar, men sluppu ikki framat fyrr enn mikumorgunin. Fóru útaftur mikudagin kl. 13:30. Tóku støðir norðanfyri, men tó ikki punt 8 norður úr Risanum, sum vanliga verður tikin nakað seinni. Fóru síðan vestan fyri Suðuroy at royna og tóku nógvar støðir vestanfyri, tó ikki punt 15 vestan fyri Sandoy, sum vanliga verður tikin á seinna túrinum. Vit komu inn á Havnina týskvøldið 5. mars kl. 22:30 og landaðu mikumorgunin. Vit fóru síðani út á túr 1906 hóskvøldið 7. mars kl 19 og byrjaðu at fiska eystanfyri kl 6:30. Vit tóku allar støðirnar eystanfyri og sigldu norðeftir eftir teimum írestandi støðunum, og síðani suður á Munkagrunnin og norðeftir vestan fyri Suðuroynna.

Veðrið var sjaskut meginpartin av túrinum og ein dag lógu vit bakk. Tilsamans vóru 100 hál tikin og neyðugt var at taka tvey hál umaftur.

**Prøvatøka:** Veiðan varð viðgjørd sambært kanningarætlanini og sýnishondbókini. Yvirlit yvir veiðu, nytrur og magar (Talva 1) er víst niðanfyri.

**Nær eru prøvarnir upparbeiddir:** Túrarnir vóru liðugt rættaðir 3. apríl. Ynskiligt er, at nytrurnar skulu vera lisnar og innlagdar í databasu í seinasta lagi 12. apríl.

**Fyribilsúrslit:** Tað var eitt sindur minni at fáa av toski í ár enn í fjør (sí myndirnar). Hinvegin var nógv meira at fáa av hýsu og upsa. Tað var heilt óvanliga nógv at fáa av hvítingi. Sera lítið hevur verið at fingið av kalva síðan 2011. Eisini hevur verið lítið at fingið av trantkongafiski og stóra kongafiski í mun til nítiárini. Sum nakað óvanligt fingu vit nakrar lodnur og eisini fingu vit nógv av lýri. Magakanningarnar vístu, at lítið var til av nebbasild og at fiskurin át sera lítið av krabbadýrum.

**Talva 1**. Yvirlitstroling á føroyska landgrunninum í februar-mars 2019. Veiða, nytrur og magar tikin á túri 1904 og 1906.

| Fiskaslag | Vekt (KG) | Nytrur | Magar |
|---|---|---|---|
| HÝSA | 41969.12 | 1003 | 297 |
| UPSI | 28113.57 | 1002 | 231 |
| TOSKUR | 26013.21 | 1035 | 272 |
| HVÍTINGUR | 4274.113 | 23 | 9 |
| HVÍTINGSBRÓDIR | 3496.081 | | |
| LÍTLI KONGAFISKUR | 3290.781 | | |
| GULLLAKSUR | 2500.013 | 50 | |
| LONGA | 2160.365 | 145 | 11 |
| SVARTKJAFTUR | 1041.439 | | |
| LÝRUR | 936.187 | 24 | 7 |
| STÓRI KONGAFISKUR | 905.962 | | |
| TUNGA | 682.083 | | |
| REYDSPRØKA | 666.952 | | |
| HAVMÚS | 277.545 | | |
| SANDSPRØKA | 241.5 | | |
| BLÁLONGA | 188.464 | 69 | 16 |
| ROGNKELSI | 187.804 | | |
| KNURRHANI | 133.54 | | |
| BROSMA | 110.637 | 44 | 2 |
| HAVTASKA | 107.85 | 2 | 2 |
| KJAFTSVARTI KONGAFISKUR | 84.122 | | |
| BÚKSVARTI HAVUR | 67.397 | | |
| GAMAL FISKUR | 50.542 | | |
| TRANTKONGAFISKUR | 46.995 | 7 | 7 |
| GLASKVOYSA | 35.72 | | |
| LÁLLA | 34.285 | | |
| STREYMSILD | 29.429 | | |
| TINDASKØTA | 20.814 | | |
| ECHINIDAE (IGULKER) | 20.613 | | |
| LOLIGO (MATHØGGUSLOKKUR) | 20.535 | | |
| HVITASKØTA | 13.415 | | |
| LITLABROSMA | 12.792 | | |
| HVASSASPREK | 12.452 | | |
| SKADDUR FISKUR | 8.519 | | |
| KALVI | 8.018 | | |
| MAKRELUR | 6.961 | | |
| HVALSPÝGGJ | 6.747 | | |
| SKRAMBUL | 4.365 | | |
| SILVURMURTUR | 4.302 | | |
| SILD | 3.33 | | |
| GLÝSUFISKUR | 3.207 | | |
| STEINBITUR | 3.06 | | |
| AGNHOEGGUSLOKKUR | 2.939 | | |
| KJAFTSVARTI HAVUR | 2.045 | | |
| HVASSKVOYSA | 1.855 | | |
| LÝSINGUR | 1.67 | | |
| TRØLLAKRABBI | 0.571 | | |
| ELEDONE | 0.57 | | |
| JÁKUPSSKEL | 0.544 | | |
| NEBBASILD | 0.263 | | |
| HUMMARI | 0.126 | | |
| LODNA | 0.069 | | |
| LÍTLIGLÁMUR | 0.038 | | |
| TILSAMANS | 117805.5 | 3404 | 854 |


Toskur
KG per hál
900
800
700
600
500
400
300
200
100
0
1980
1985
1990
1995
2000
2005
2010
2015
2020
2025


Hýsa
KG per hál
500
450
400
350
300
250
200
150
100
50
0
1980
1985
1990
1995
2000
2005
2010
2015
2020
2025


Longa
KG per hál
30
25
20
15
10
5
0
1980
1985
1990
1995
2000
2005
2010
2015
2020
2025


Upsi
KG per hál
600
500
400
300
200
100
0
1980
1985
1990
1995
2000
2005
2010
2015
2020
2025


Hvítingur
KG per hál
45
40
35
30
25
20
15
10
5
0
1980
1985
1990
1995
2000
2005
2010
2015
2020
2025


Kalvi
KG per hál
5
4.5
4
3.5
3
2.5
2
1.5
1
0.5
0
1980
1985
1990
1995
2000
2005
2010
2015
2020
2025


Tunga
KG per hál
0
1
2
3
4
5
6
7
8
1980
1985
1990
1995
2000
2005
2010
2015
2020
2025


Reydsprøka
KG per hál
0
1
2
3
4
5
6
7
8
9
10
1980
1985
1990
1995
2000
2005
2010
2015
2020
2025


Gulllaksur
KG per hál
250
200
150
100
50
0
1980
1985
1990
1995
2000
2005
2010
2015
2020
2025


Trantkongafiskur
KG per hál
70
60
50
40
30
20
10
0
1980
1985
1990
1995
2000
2005
2010
2015
2020
2025




**Viðmerkingar:** Viðmerkingar (smálutir av ymsum slagi) til túrin eru skrivaðar í Tur1904d.doc.

Petur Steingrund